# KUR VISITTUR



## Skarvanes versus stórbýin

*Anna hevur búð bæði í Keypmannahavn, Tórshavn, Reykjavík, Skopun og í Skarvanesi.*

*– Um tað er nakar munur? Tja, tað kemur ikki ann uppá staðið, men uppá persónin. Eg trúgvi, at óansæð hvar í heiminum tú ert, so kemur heimurin ikki til tín, men tað er tú sum má út eftir heiminum.*

*– Fyri mær er ikki øðrvísi at búgva á Skarvanesi, enn aðrastaðni á Sandoynni. Tað einasta set-back'ið sum so er, at tað rennur kelduvatn í kranan og at vegirnir kundu verið betri asfalteraðir, sigur Anna sum er íðin brigde-spælari og er í Havn í hesum ørindum hvørt hóskvøld. Hjá húskinum hjá Annu og Sjúrða er langt til næsta handil, um okkurt var sum vantaði til matgerðina. Men tað hava tey vant seg við:*

*– Ja, tað kann onkutíð henda, at vit ikki hava nakra mjólk eftir um kvøldið. Men tað gerst ikki við. So verður bara eingin mjólk til havagreytin morgunin eftir.*

## Fyrigyklaðir silvurdálar úr Havn

Sum útbúgvin stjórnmálafrøðingur fylgir Anna væl við tí politiska orðaskiftinum, bæði tí lokala og landspolitiska.

Eitt evni sum kann øsa Annu upp er tosið ídag um at leggja kommunur saman, - í hesum føri, at Sandoyggin skal upp í ta stóru Tórshavnar Kommunu.

Tað sjáldsama var, at tá Føroyar skuldu gerast til eitt einstakt valdømi var fólkið í Sandoynni tey, ið vóru einamest ímóti tí. Tey hugsaðu helst sum so, at um so verður, er vandi fyri at tey mistu alla politiska ávirkan.

- Men hygg nú. Nú vilja fleiri av teimum leggja saman við Havnini, og harvið sjálvboðið lata alla politiska ávirkan upp í hendurnar á øðrum. Ja, tað er ein spurningur, um ávísir bygdaráðsformenn veruliga vilja selja nærdemokrati'ið fyri nakrar fyrigyklaðar silvurdálar úr Havnini, spyr hon íðin á málinum.

- At Heðin Mortensen er óførur at asfaltera vegir í Havn, tað vita tey flestu sum koyra har. Men eg loyvi mær stórliga at ivast í, um hann fer at brúka eins nógvar pengar her suðuri.

Hinvegin eru sandoyingar tiltiknir fyri at duga væl at taka til. Tað var kanska sum ein teirra segði um ætlanina - ella fríggjarí'ið - hjá skúvoyingum at leypa upp um Sandoynna og leggja beinleiðis saman við Tórshavnar kommunu.

Tað góða var, at tað vóru so nógv eldri fólk í Skúvoy, at fóru neyvan at koma nøkur børn undan hasum fríggjarí'inum.